# Bóndagarðurin – Afrikanska ævintýrið

**Mánadag 23. februar byrjar ein nýggj donsk, sokallað, reality-sendirøð á Tv3. »Farmen - Det afrikanske eventyr« er heitið**

TELEVARPIÐ

Hetta er ein undirhaldsrøð, sum í formi minnir um eina samanblanding av teimum kendu undirhaldssendingunum »Robinson« og »Big Brother«, har luttakarar kappast um at halda longst út. Sendingin snýr seg um ein bólk av sera ymiskum persónum, ið allir hava vent siviliseraða heiminum bakið. Saman skulu hesi - uttan at vita nakað sum helst um bóndagarðshald, jarðarbrúk ella djórahald - royna at fáa gerandisdagin at ganga á einum veruligum bóndagarði.





## Slakt og jarðarbrúk

Spenningurin byrjar beinanvegin, tá luttakararnir koma til ein manstóman bóndagarð. Her skulu teir sjálvir standa fyri øllum - dyrka jørðina, slakta djór o.s.fr.. Frá fyrsta degi eru luttakararnir fullkomiliga einsamallir á einum bóndagarði í Suðurafrika, sum harafturat er púra avskorin frá umheiminum.

## »Ovastin«

Hvørja viku verður ein av luttakarunum útnevndur til ovasta fyri at leiða og býta arbeiðið út. Hesin ovastin hevur suverenan myndugleika yvir hinum. Hann ella hon avger eisini, hvat hvør luttakari ger í sambandi við vikuligu uppgávuna. Tað er so, at hvørja viku fáa luttakararnir ein uppgávu frá vertinum Sonny Rønne Petersen, sum er kendur frá »Robinson Ekspeditóini«. Um uppgávan verður nóg væl loyst, fáa luttakararnir proviant og annað møguligt treingjandi tilfar afturfyri. Afturat hevur Ovastin til uppgávu at peika á ein »tví-stríðsmann«, sum skal stríðast fyri lív ella deyða á tí sokallað »Tinginum«, ið er hvørja viku.

## »Tingið« og »Taparaleivdirnar«

Hvørja viku koma luttakararnir og verturin saman á »Tinginum«. Her verður prátað um lívið á bóndagarðinum og eisini velur tví-stríðsmaðurin mótstøðumann sín. Stríðsmennirnir báðir skulu so síðan velja, hvat slag av bardaga skal fara fram, valt verður ímillum hesi trý: styrki, teknikk og skinsemi. Vinnarin verður sjálvandi verandi á bóndagarðinum, meðan taparin verður sendur av garðinum. Men, áðrenn taparin fer, velur han Ovastan fyri komandi vikuna. So spennandi verður at vita, hvussu leikur fer fram - neyvan verður hetta ein lættligur leikur.


Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN

GRUNDLEGGJANDI LEIÐARAÚTBÚGVING

Tað fyrsta holdið í hesi nýggju útbúgvingini er nú liðugt við góðari eftirmeting, og hold 2 byrjar 15. mars 2004.

**Kunningarfundur verður á Føroya Handilsskúla mikudagin 25. februar kl. 16.00**

Útbúgvingin er løgd til rættis av m.a. Ledelsesakademiet ved Århus Købmandsskole og er góðkend av Ledernes Hovedorganisation í Danmark. Útbúgvingin fer fram á sama hátt sum Diplomleiðaraútbúgvingin. Skift verður ímillum stutt útbúgvingarmodul, sum vara 2-3 dagar, í alt 5 ferðir og heimauppgávur, sum taka støði í tínum verkliga arbeiði.

Undirvísingin tekur støðið í gerandisdegnum hjá luttakaranum og gevur tær leiðsluamboð, sum ger teg betri føran fyri at loysa tínar leiðsluuppgávur. Skipað verður fyri arbeiðsbólkum, og lestrarvegleiðing er til tey lesandi.

Tað er ein týðandi liður í útbúgvingini, at luttakararnir koma frá ymsum virkjum/arbeiðsplássum, bæði almennum og privatum. Leiðarar í almennum stovnum kunnu læra av leiðarum í privatum virkjum - og umvent. Leiðarar innan tænastuvinnuna kunnu læra av leiðarum í framleiðsluvinnuni og umvent.

**Málbólkur**
Útbúgvingin hóskar sera væl til
* nýggjar og komandi leiðarar
* leiðarar uttan leiðsluútbúgving á millumstigi
* royndar leiðarar við broyttum/nýggjum leiðslufunktiónum

**Luttakararnir fáa venjing í m.a.**
* at býta út uppgávur - leiðslustíli og leiðsluhátti
* at leggja egnar ætlanir til rættis - fáa skil á egnari tíð
* motivatiónsfaktorar - støðuásett leiðsla
* loysnir av trupulleikum - persónlig virkisætlan

**Tíð: 96 tímar, 5 modul, 12 dagar í 6 mðr., kl. 08.30-16.00**

Meira fæst at vita um skeiðini á **www.skeidsdepilin.fo**, har kanst tú eisini tekna teg til útbúgvingina.

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo


# Champions League – kappingin fyri vinnarar

**Champions League er aftur á skránni. Talan er um endaumførini, og liðini, ið eru komin víðari úr bólkaspælinum, skulu í eldin**

TELEVARPIÐ



Lagt verður til brots týskvøldið. Tá bresta Bayern Munchen og Real Madrid saman og dysturin verður sendur beinleiðis á Tv3. Hesin dysturin skuldi uttan iva borga fyri einum fótbóltsligum hæddarpunkt. Týska liðið liggur í oddinum í týsku bestu deildini og spanska liðið hevur stóra ætlanir fyri framtíðina. Seinni á kvøldinum verður dysturin millum Celta Vigo - Arsenal sendur.

**UEFA Champions League á Tv3 týsdag 24. februar**
Beinleiðis, kl. 19.00
Bayern Munchen–Real Madrid

Kl. 22.50
Champions League:
Celta Vigo–Arsenal

**Á 3+ mikudag 25. februar**
Beinleiðis, kl. 19.00:
FC Porto–Manchester United
Kl. 21.55
Stuttgart–Chelsea






FILMSTEIGURIN

# Spøkilsishúsið

Tá húsameklarin Jim Evers fær eygað á stásiligu húsini á eksklusiva grundstykkinum í sumpinum í Lousianna, veit hann, at hann hevur funnið eydnuna. Provosiónin til hansara verður sera stór. Men tað, hann ikki veit, er, at ein privatur kirkjugarður fylgir við handlinum og við honum 99 spøkilsi. Samstundis er tað skjótt tann minni trupulleikin, tí spøkilsini hava hugsað sær konu hansara, Sara, sum spøkilsi nummar 100.

Jim drønar runt í loyniligu gongunum, verður burtur millum loyniligar hurðar, og fær fryktilig loyndarmál at vita frá eini spákonu í eini krystallkúlu. Við hjálp frá báðum børnum sínum og kanska nøkrum spøkilsum við, sum man (bókstaviliga sagt) ikki veit, hvar man hevur, má Jim trossa ósigiligar ræðslur og vinna á egnum ótta til tess at bjarga Sáru frá einum yvir 100 ára gomlum forbannilsi.





Eddie Murphy er í sínum vanliga sjarmerandi og speedsnakkandi hýri sum húsameklarin, ið má »yvirliva« sín húsahandil í Spøkilsishúsinum, og Rob Minkoff hevur leikstjórnað.





**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 20.02. | kl. $19^{00}$ | Fríggjadagin | 20.02. | kl. $21^{00}$ |
| Leygardagin | 21.02. | kl. $19^{00}$ | Leygardagin | 21.02. | kl. $21^{00}$ |
| Sunnudagin | 22.02. | kl. $18^{30}$ | Sunnudagin | 22.02. | kl. $20^{30}$ |

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 20.02. kl. $23^{00}$ Leygardagin 21.02. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $22^{30}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 20.02. kl. $17^{00}$ Leygardagin 21.02. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $16^{30}$




**Billettprísur: 65,- kr.**
Fríggjadagin 20.02. kl. $18^{00}$ Leygardagin 21.02. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $17^{30}$




**Billettprísur: 75,- kr.**
Fríggjadagin 20.02. kl. $20^{00}$ Leygardagin 21.02. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 22.02. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 20.02. kl. $23^{15}$ Leygardagin 21.02. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 22.02. kl. $22^{45}$